# Barna- og útbúgvingarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08-01-2023 |
| Mál nr.: | 23/21201 |
| Málsviðgjørt: | MM |
| Ummælistíð: | Frá 10. januar til 31. januar |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
(Ásetingar um at boða frá, fyribyrgjandi fyriskipanir, stuðul til foreldramyndugleikan, avgerðir um ávís viðurskifti hjá barninum og um at flyta eitt barnaverndarmál)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd (Barnaverndarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 14 verður sum stk. 7 sett:
‘‘*Stk. 7.* Fáa persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing’’.

**2.** Í § 15, stk. 1 verður aftan á nr. 11 sum nýtt nr. 12 sett:
‘‘12) veita aðra hjálp til barnið og/ella familjuna so sum ráðgeving, viðgerð, praktiskan og námsfrøðiligan stuðul ella líknandi.’’

**3.** Í § 15, stk. 2 verður ‘‘stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9 og 10’’ broytt til: ‘‘stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9, 10 og 12’’.

**4.** Í § 19 verður sum stk. 5 sett:
‘‘*Stk. 5.* Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Fyriskipanirnar skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til at barnið varð

sett heiman, og hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.’’

**5.** Í § 21 verður sum stk. 3 sett:
‘‘*Stk. 3.* Tá tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini, kann barnaverndarnevndin, grundað á eina leypandi uppfylgjan og eftirlit við barninum sambært § 16, taka avgerð um at broyta uppihaldsstað, viðgerð og útbúgving v.m., ímeðan barnið er sett heiman.’’

**6.** § 42, stk. 2, nr. 5 verður strikað.

**7.** Í § 58 verður sum stk. 4 sett:
‘‘*Stk. 4.* Avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.’’

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
Hetta lógaruppskotið er grundað á ymiskar trupulleikar, sum hava stungið seg upp ígjøgnum tíðina, og sum gera tað ynskiligt at broyta lógina. Eisini hava myndugleikar og stovnar innan barnaverndarøkið gjørt vart við ávís viðurskifti í lógini, sum antin mangla ella ikki virka eftir ætlan.

Endamálið við broytingunum er sostatt sum heild at tillaga lógina og gera rættingar, sum bøta um lógina.

Hugtakið "barn" verður í hesum lógaruppskoti brúkt bæði í mun til børn og ung, og sostatt eisini í mun til ung í aldrinum 18 – 23 ár, um annað ikki er tilskilað.

Barnaverndarlógin ásetur í § 3, at lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum. Fráboðanarskyldan í kapittul 3 er tí einans galdandi fyri børn og ung, sum eru stødd í Føroyum. Harumframt heimilar fráboðanarskyldan í § 62 barnaverndarnevndini at kunna rætta myndugleika uttanlands, um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands.

Fakfólk í almennum størvum og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu sum nú er ikki boða viðkomandi myndugleikum í Danmark frá, um tey fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi. Samstundis kunnu ásetingarnar í dátuverndarlógini um at geva víðari persónupplýsingar elva til óvissu hjá einstaka fakfólkinum um, hvørt tey kunnu geva víðari upplýsingar um persónlig viðurskifti um eitt barn til ein myndugleika í Danmark uttan greiða heimild í lóg.

Heimild at boða einum donskum myndugleika frá verður tískil sett inn í § 14, stk. 7, sum hevur við sær, at fakfólk í almennum størvum, og fakfólk, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá, um tey í sambandi við starv sítt fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, ella um eitt barn beint eftir føðing fer at fáa tørv á serligum stuðli vegna viðurskifti hjá foreldrunum. Talan er ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein møguleika at boða frá ávísum viðurskiftum um eitt barn til ein danskan myndugleika.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at viðkomandi myndugleikar í Danmark verða varugir við og fáa kunnleika til børn og ung sum mistrívast, soleiðis at røttu myndugleikar kunnu meta um, um tørvur er á at seta í verk fyriskipanir fyri eitt ávíst barn.

Fyribyrgjandi fyriskipanir kunnu verða settar í verk eftir § 15, stk. 1 í barnaverndarlógini, um kanning sambært § 45 vísir, at hetta er neyðugt. Sambært viðmerkingunum til ásetingina í § 15, stk. 1 er dentur lagdur á at orða fyriskipanirnar soleiðis, at tær kunnu tulkast vítt. Hetta er gjørt fyri at geva barnaverndarnevndini víðar heimildir til at seta í verk neyðugar fyriskipanir fyri barnið og/ella familjuna, og fyri ikki at forða barnaverndarnevndini í at veita hjálp, tá ið tað verður mett neyðugt. Tó hava barnaverndartænasturnar gjørt vart við, at tørvur er á eini breiðri heimild, sum ikki er tengd at ávísum yrki, tilboði ella øki, og sum ikki er tikin hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í § 15, stk. 1. Talan er sostatt einans um eina nágreining av viðmerkingunum til ásetingina og galdandi siðvenju.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 15, stk. 1, nr. 12 er, at geva barnaverndarnevndini breiðri rammur í mun til at málrætta hjálpina og stuðulin til barnið og/ella familjuna, og gera tað møguligt at seta í verk fyriskipanir, sum ikki eru tiknar hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í § 15, stk. 1, nr. 1-11. Nýggir arbeiðsháttir og mannagongdir mennast leypandi, og nýggj framtøk og tiltøk stinga seg upp, og hetta skal ikki verða avmarkað av uppreksanini í § 15, stk. 1. Treytirnar fyri at seta í verk fyriskipanir sambært § 15 skulu tó altíð verða loknar.

Fyriskipan sambært § 15, stk. 1, nr. 12 kann verða sett í verk um neyðugt, hóast foreldramyndugleikin ikki loyvir tí. Barnaverndarnevndin skal tó altíð royna at samstarva við foreldrini viðvíkjandi fyribyrgjandi fyriskipanum sambært § 15.

Við hesum lógaruppskoti verður í § 19, stk. 5 sett inn heimild at seta í verk fyriskipanir sambært § 15 fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Talan er einans um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til galdandi ásetingar. Grundað á viðmerkingar til barnaverndarlógina er longu greið heimild til at seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av viðmerkingunum til barnaverndarlógina í § 19, stk. 5, sum ásetur, at barnaverndarnevndin kann veita hjálp og stuðul til foreldramyndugleikan eftir tørvi, ímeðan barnið er sett heiman, óansæð um barnið er sett heiman við ella uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum.

Stuðulin kann t.d. fevna um sálarfrøðiligar viðtalur, familjuviðgerð, skeiðir í foreldraførleika ella líknandi. Stuðulin skal hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman. Tó kann einhvør tørvur ikki hava við sær stuðul sambært hesi grein. Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum.

Endamálið við ásetingini er, at stuðulin skal viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum eru orsøk til umsorganaryvirtøkuna, og á henda hátt hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.

Í § 21, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn við tí endamáli at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta.

Tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at barnaverndarnevndin hevur atgongd til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum.

Í summum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna. Í øðrum førum er foreldramyndugleikin ímóti ella ikki samdur í einari avgerð hjá barnaverndarnevndini um ávís viðurskifti hjá barninum, sum barnaverndarnevndin metir er neyðugt fyri barnið, og sum barnið sjálvt ynskir. Harumframt er foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð til barnsins besta um ítøkiligar støður, sum barnið stendur í vegna t.d sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin av ymiskum orsøkum ikki er serliga tætt knýttur at barninum ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og

tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Tá er tað týdningarmikið, at barnaverndartænastan kann taka eina avgerð í málinum, sum er best fyri barnið. Vísast skal til nærri lýsingina av ásetingini í serligu viðmerkingunum.

§ 42, stk. 2, nr. 5 í barnaverndarlógini verður strikað grundað á, at ásetingin verður mett óneyðug í sambandi við at skriva eina gerðabók um fundirnar hjá barnaverndarnevndini.

Í § 58, stk. 4 verður nýggj áseting sett inn, sum ger tað møguligt at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

Sambært barnaverndarlógini verður barnaverndarøkið umsitið av staðbundnum kommunalum barnaverndartænastum. Barnaverndarmál verða umsitin alt eftir, hvar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva. Heimild er ikki í galdandi barnaverndarlóg hjá nøkrum myndugleika at taka avgerð um, at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

Eitt barnaverndarmál verður tó sjálvvirkandi flutt, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, flyta bústað til eitt annað barnaverndarøki, sbrt. § 58 í barnaverndarlógini.

Í heilt serligum førum kann tørvur verða á, at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Hetta kann t.d. verða vegna eina sera fastlæsta støðu hjá ávísum foreldrum í einum ítøkiligum barnaverndarmáli. Tørvur kann í hesum førum verða á, at ein onnur barnaverndarnevnd yvirtekur málið til at viðgera og meta um. Í summum førum kann hetta gera mun fyri samstarvið og samskiftið við barnaverndartænastuna um málið, og verða til gagns fyri bæði barnið og familjuna. Hetta verður tó einans møguligt í heilt serligum førum, harí barnaverndarnevndin metur, at hetta er alneyðugt fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 58, stk. 4 er at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, harí málið og støðan tykist so fastløst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

**1.2. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Barnaverndarstovu Føroya, Barnaverndartænastunum, Kærustovni Føroya, Almannaverkinum, Fosturforeldrafelagnum, Føroya Kommunufelag, Løgmálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Løgtingsins Umboðsmanni (BUM), Familjufyrisitingini, Sosialráðgevarafelag Føroya, Føroya Pedagogfelag, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Ljósmøðrafelag Føroya, Føroyskir Sálarfrøðingar, Heilsurøktarafelagnum, Dátueftirlitinum, Megd, Føroya Landfúta, Barnabata og MEA.

Viðmerkingar frá ummælispørtum...

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Hóast uppskotið hevur við sær ávísar minni umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, sí niðanfyri undir pkt. 2.2., so verður ikki mett, at broytingin kemur at ávirka arbeiðsorkuna hjá nøkrum myndugleika, og eigur tískil ikki at hava stórvegis fíggjarligan týdning fyri land og kommunur.

Broytingin í § 15, stk. 1, nr. 12 um at veita aðra hjálp til barnið og/ella familjuna, verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Hetta er grundað á, at talan einans er um eina nágreining av viðmerkingunum til ásetingina í § 15 og galdandi siðvenju. Sambært viðmerkingunum til ásetingina í § 15, stk. 1 skulu fyriskipanirnar í stk. 1 tulkast vítt. Hetta er gjørt fyri ikki at forða barnaverndarnevndini í at veita hjálp, tá ið tað verður mett neyðugt. Barnaverndartænasturnar hava tó spurt eftir einari breiðri áseting, ið ikki er avmarkað av uppreksanini í § 15, stk. 1.

Nýggja ásetingin í § 15, stk. 1, nr. 12 gevur barnaverndarnevndini breiðri rammur í mun til at málrætta hjálpina og stuðulin til barnið og/ella familjuna, og ger tað møguligt at seta í verk fyriskipanir, sum ikki eru tiknar hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í § 15, stk. 1, nr. 1-11. Treytirnar fyri at seta í verk fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 eru tó tær somu og skula altíð verða loknar.

Broytingin í § 19, stk. 5 um at seta í verk fyriskipanir sambært § 15 fyri foreldramyndugleikan, verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Hetta er grundað á, at talan einans er um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til galdandi ásetingar. Sambært viðmerkingunum til barnaverndarlógina er longu heimild til at seta fyriskipanir í § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av viðmerkingunum.

Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum. Einhvør tørvur kann sostatt ikki hava við sær stuðul sambært hesi grein.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið og kommunur við tað, at persónar í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, fáa møguleika at boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá, um tey fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um at seta í verk fyriskipan sambært § 15 fyri foreldramyndugleikan. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, ímeðan

barnið er sett heiman, um tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

Uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Sí um fíggjarligar avleiðingar av hesari broytingini í punkt 2.1.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur við sær positivar sosialar avleiðingar fyri foreldur at umsorganaryvirtiknum børnum, ið kunnu fáa hjálp og stuðul sambært § 15, ímeðan barnið er sett heiman.

Uppskotið hevur við sær positivar avleiðingar fyri foreldur við tað, at eitt barnaverndarmál kann verða flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Á henda hátt hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, harí málið og støðan tykist so fastløst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á millumtoðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ikki ávirkan á tvørgangandi millumtoðasáttmálar á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

Lógaruppskotið ger inntriv í rættin hjá foreldramyndugleikanum at einum umsorganaryirtiknum barni, í mun til at barnaverndarnevndin fær heimild at taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, sum áður hevur ligið hjá foreldramyndugleikanum at avgera.

Hetta er grundað á, at tað kann hava stóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnaverndarnevndini til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum.

Í summum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna. Í øðrum førum er foreldramyndugleikin ímóti ella ikki samdur í einari avgerð hjá barnaverndarnevndini um ávís viðurskifti hjá barninum, sum barnaverndarnevndin metir er neyðugt fyri barnið, og sum barnið sjálvt ynskir. Harumframt er foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð til barnsins besta um ítøkiligar støður, sum barnið stendur í vegna t.d sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin av ymiskum orsøkum ikki er serliga tætt knýttur at barninum ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Tá er tað týdningarmikið, at barnaverndartænastan kann taka eina avgerð í málinum, sum er best fyri barnið.

Endamálið við ásetingini í § 21, stk. 3 er at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini og sum er til barnsins besta.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ongar skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimildir til persónar, sum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn undir 18 ár, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum.

Lógaruppskotið leggur heimildir til kommunurnar við tað, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um at seta fyriskipan sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, eins og barnaverndarnevndin kann taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum, ímeðan barnið er sett heiman, um tað verður mett neyðugt fyri endamálið við heimansetanini. Eisini leggur lógaruppskotið heimildir til barnaverndarnevndinar í mun til at avtala kann gerast ímillum barnaverndarnevndir í heilt serligum førum um, at eitt barnaverndarmál verður flutt frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Barnaverndarlógin ásetur í § 3, at lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum. Fráboðanarskyldan í kapittul 3 er tí einans galdandi fyri børn og ung, sum eru stødd í Føroyum. Harumframt heimilar fráboðanarskyldan í § 62 barnaverndarnevndini at kunna rætta myndugleika uttanlands, um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands.

Fáa fakfólk í Føroyum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu tey sum nú er ikki boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Samstundis kunnu ásetingar um at geva víðari persónupplýsingar í dátuverndarlógini elva til óvissu hjá einstaka fakfólkinum um, um tey kunnu geva víðari upplýsingar um persónlig viðurskifti viðvíkjandi einum barni til ein danskan myndugleika uttan greiða lógarheimild.

Tískil verður nýggj áseting sett inn í § 14, stk. 7, harí persónar, sum í sambandi við almenna starv sítt, og persónar, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, kunnu boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum. Ásetingin fevnir eisini um ófødda barnið, sum vegna viðurskifti hjá foreldrunum, kann fáa tørv á serligum stuðli eftir føðing.

Ásetingin hevur við sær, at fakfólk í almennum størvum, og fakfólk, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, kunnu boða viðkomandi myndugleika (kommunalbestyrelse) í Danmark frá, um tey í sambandi við starv sítt fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, ella um eitt barn beint eftir føðing fer at fáa tørv á serligum stuðli vegna viðurskifti hjá foreldrunum. Talan er ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein møguleika hjá fakfólkum at boða frá ávísum viðurskiftum viðvíkjandi einum barni, sum býr í Danmark, til ein danskan myndugleika.

Hetta merkir, at alment sett starvsfólk sum t.d. fakfólk hjá skúlatannlæknanum, námsfrøðingar og lærarar í fólkaskúlanum, frítíðarskúlum, eftirskúlum, fakfólk í kommunalum dag- og frítíðartilboðum ella almennum tilhaldsstøðum, kreppumiðstøðum og viðgerðartilboðum, kunnu boða einum donskum myndugleika (kommunalbestyrelse) frá, um eitt barn undir 18 ár, sum býr í Danmark, kann hava tørv á, at ávís fyriskipan verður sett í verk.

Eisini kunna persónar, sum útinna virksemi innan barna- og ungdómsøkið fyri tað almenna, herundir t.d. læknar, sum ikki eru alment settir og persónar, sum t.d. arbeiða í ymiskum dag- og frítíðartilboðum, starvsfólk á fríðum fólkaskúlum og persónar, sum starvast á tilhaldsstøðum, kreppumiðstøðum, viðgerðartilboðum ella privatum tilboðum, sum útinna uppgávur fyri tað almenna, eru fevnd av rættinum til at boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá.

Ásetingin kann t.d. verða nýtt í støðum, harí eitt barn undir 18 ár, sum býr í Danmark, men sum er statt í Føroyum, fortelur einum fakfólki í Føroyum um seg sjálvan ella systkini hjá

sær, sum eru stødd og búgva í Danmark, og sum hava verið fyri vanrøkt og/ella ágangi. Í hesari støðuni kann fakfólkið í Føroyum boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá hesum.

Ásetingin hevur við sær, at heimild er til at boða einum donskum myndugleika frá ávísum átaluverdum viðurskiftum viðvíkjandi einum barni. Rætturin til at boða frá kemur sostatt framum tagnarskylduna hjá fakfólkinum, eins og fakfólkið fær sama rætt til at geva upplýsingar víðari eftir dátuverndarlógini til ein danskan myndugleika sum eftir ásetingini um fráboðanarskyldu í § 14.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at viðkomandi myndugleikar í Danmark verða varugir við og fáa kunnleika um børn og ung sum mistrívast, soleiðis at røttu myndugleikarnir kunnu meta um, um tørvur er á at seta í verk fyriskipanir.

Sambært § 59 í dátuverndarlógini krevur flutningur av persónupplýsingum til útlond ikki serliga góðkenning ella loyvi frammanundan. Flutningurin av persónupplýsingum skal tó vera í samsvari við dátuverndarlógina, og verður framdur eftir einari ítøkiligari meting í hvørjum einstøkum máli.

Nýggja ásetingin í § 14, stk. 7 verður sett inn í barnaverndarlógina sambært avtalu við danska Social-, Bolig- og Ældreministerie, sum hevur sett somu áseting/heimild inn í nýggju donsku ‘barnets lov’.

**Til § 1, nr. 2**
Fyribyrgjandi fyriskipanir kunnu verða settar í verk eftir § 15, stk. 1 í barnaverndarlógini, um kanning sambært § 45 vísir, at hetta er neyðugt. Sambært viðmerkingunum til ásetingina í § 15, stk. 1 er endamálið við orðingini av ásetingini, at geva barnaverndarnevndini víðar heimildir at seta í verk neyðugar fyriskipanir fyri barnið og/ella familjuna. Dentur er lagdur á, at orða fyriskipanirnar í § 15, stk. 1 soleiðis, at tær kunnu tulkast vítt. Hetta er gjørt fyri ikki at forða barnaverndarnevndini í at veita hjálp, tá ið tað verður mett neyðugt fyri familjuna og/ella barnið. Barnaverndartænasturnar hava tó gjørt vart við, at tørvur er á eini breiðri heimild, sum ikki er tengd at ávísum yrki, tilboði ella øki, og sum ikki er tikin hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í galdandi § 15, stk. 1. Talan er sostatt einans um eina nágreining av viðmerkingunum til ásetingina og galdandi siðvenju.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 15, stk. 1, nr. 12 er, at geva barnaverndarnevndini breiðri rammur í mun til at málrætta hjálpina og stuðulin til barnið og/ella familjuna, og gera tað møguligt at seta í verk fyriskipanir, sum ikki eru tiknar hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í § 15, stk. 1, nr. 1-11. Nýggir arbeiðshættir og mannagongdir mennast leypandi, og nýggj framtøk og tiltøk stinga seg upp, og hetta skal ikki verða avmarkað av uppreksanini í § 15, stk. 1.

Treytirnar fyri at seta í verk fyriskipanir sambært § 15, stk. 1 skulu tó altíð verða loknar. Fyriskipanir kunnu einans setast í verk, um kanning sambært § 45 vísir, at hetta er neyðugt, og um samtykki og samstarv er við foreldramyndugleikin, sbrt. tó § 15, stk. 2. Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, skal samtykki fáast frá báðum foreldrum, hóast tey ikki búgva saman. Eisini skal hjálpin og stuðulin vera málrættaður teimum trupulleikum, ið vórðu avdúkaðir í sambandi við kanningina sambært § 45 í barnaverndarlógini.

Umsorganaryvirtøkur kunnu ikki fremjast eftir hesari áseting sambært orðunum ‘‘aðra hjálp’’. Tó kann hjálpin/stuðulin gott veitast uttanfyri heimið.

Víst verður til lógarviðmerkingarnar til galdandi § 15 í barnaverndarlógini.

**Til § 1, nr. 3**
Nýggja ásetingin í § 15, stk. 1, nr. 12 verður skoytt uppí ásetingina í § 15, stk. 2 sum ein fyriskipan, ið kann setast í verk um neyðugt, hóast foreldramyndugleikin ikki loyvir tí.

Barnaverndarnevndin skal tó sum meginregla royna at samstarva við foreldrini viðvíkjandi fyriskipanum sambært § 15. Men um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan ikki samtykkja, kann barnaverndarnevndin seta fyriskipanir sambært § 15, stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9, 10 og 12 í verk, um tað má metast at vera av munandi týdningi fyri barnsins serliga tørv á stuðli, og tá ið endamálið við fyriskipanini verður mett at kunna røkkast uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, skal samtykki fáast frá báðum foreldrum, hóast tey ikki búgva saman, í sambandi við at seta í verk fyriskipanir sambært § 15.

Treytin fyri, at fyriskipanin eydnast er, at barnið sjálvt er sinnað at fara í viðgerð, hóast foreldramyndugleikin ikki gevur samtykki til tess. Um tann ungi er 15 ár, skal samtykki fáast til vegar frá honum, áðrenn fyriskipan verður sett í verk, og um barnið er undir 15 ár, skal tað takast við upp á ráð, í tann mun tað er gjørligt.

Barnaverndarnevndin hevur tó ikki heimild til at noyða eina avgerð ígjøgnum, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, framvegis seta seg upp ímóti avgerðini; tað vil siga taka barnið við tvingsli úr heiminum og senda tað til viðgerð ella annað.

Sí nærri um ásetingina í § 15, stk. 2 í viðmerkingunum til barnaverndarlógina.

**Til § 1, nr. 4**
Í § 19, stk. 5 verður heimild sett inn til at seta í verk fyriskipanir sambært § 15 fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Ikki einhvør tørvur kann hava við sær hjálp og stuðul sambært hesari greinini. Stuðulin skal hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, meðan tað er sett heiman.

Óansæð um møguleiki er fyri, at foreldrini sum frá líður kunnu hava umsorgan aftur fyri barninum ella ikki, so hava foreldrini oftast ein týðandi leiklut í lívinum hjá barninum. Fyriskipanir kunna tí eisini setast í verk í mun til at hjálpa og stuðla foreldrunum í at hava samveru við barnið, og á henda hátt viðvirka til eina jaliga menning hjá barninum.

Stuðulin kann t.d. fevna um sálarfrøðiligar viðtalur, familjuviðgerð, skeið í foreldraførleika ella líknandi.

Sambært § 27, stk. 7 í barnaverndarlógini er møguligt at seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri barnið og fosturforeldrini, ímeðan barnið er til fosturs. Hetta merkir, at tað t.d. er møguligt at seta stuðul í heimið, geva fosturforeldrum sálarfrøðiliga hjálp, veita familjuviðgerð o.s.fr. Mett verður, at barnið á henda hátt fær tað best møguliga tilboðið frá skipanini.

Við hesum lógaruppskoti verður sama heimild sett inn í § 19, stk. 5, soleiðis at møguligt verður at seta í verk fyriskipanir fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Talan er einans um eina nágreining av galdandi siðvenju og viðmerkingum til barnaverndarlógina.

Í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, nr. 2 stendur í mun til at veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul, at barnaverndarnevndin kann veita familjuni viðgerð, tá ið barnið er sett heiman, um tað verður mett at hava týdning fyri barnið, t.d. um familjan við familjuviðgerð kann betra um sínar liviumstøður soleiðis, at barnið kann koma heim aftur at búgva.

Í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, nr. 3 stendur í mun til at veita stuðul í heimið, at ímeðan barnið er sett heiman, kann vera neyðugt at veita familjuni stuðul, soleiðis at samanhangur er í viðgerðini, og barnið hevur betri møguleika fyri at virka, tá ið tað kemur aftur til foreldrini.

Harumframt stendur í viðmerkingunum til § 47 í barnaverndarlógini, at ein sjálvstøðug ætlan skal gerast fyri foreldrini, ímeðan barnið er sett heiman, og at fyriskipan skal setast í verk í mun til tann tørv, ið kanningin sambært § 45 hevur lýst. Víðari stendur, at tá ið eitt barn verður set heiman, er útgangsstøðið, at barnið skal heim aftur. Tískil er umráðandi at arbeiða við familjuni í mun til hetta. Júst hvør fyriskipan eigur at verða sett í verk, má metast um við støði í kanningini eftir § 45. Harumframt stendur, at tað sum eyðkennir fyriskipanirnar er, at tær antin eru ætlaðar at loysa trupulleikar hjá foreldrunum, ella ætlaðar at fyrireika familjuna til, at barnið kemur heim aftur. Er orsøkin til at barnið er sett heiman trupulleikar hjá foreldrunum, t.d. vansorgan, eigur ein fyriskipan at setast í verk til at loysa henda trupulleika.

Grundað á nevndu viðmerkingar er longu greið heimild til at seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan at barninum, ímeðan barnið er sett heiman. Tørvur er tó á einari nágreining av hesum viðmerkingum í einari nýggjari áseting í § 19, stk. 5, sum gevur barnaverndarnevndini heimild til at veita hjálp og stuðul til foreldramyndugleikan eftir tørvi, ímeðan barnið er sett heiman, óansæð um barnið er sett heiman við ella uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum. Hesin stuðulin skal viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum eru orsøk til umsorganaryvirtøkuna, og á henda hátt hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan barnið er sett heiman.

Tað er altíð ein ítøkilig meting í hvørjum einstøkum máli, um fyriskipan er neyðug, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at loysa trupulleikarnar hjá foreldrunum.

Fyriskipanir sambært § 15 kunnu einans setast í verk við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Orsøkin til hetta er, at tað ikki kemur nakað burturúr at seta fyriskipanir í verk fyri foreldrini ímóti teirra vilja. Hetta má vera teirra egna val.

Vísast skal til viðmerkingarnar til § 15, stk. 1.

**Til § 1, nr. 5**
Í § 21, stk. 3 verður nýggj áseting sett inn fyri at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini.

Hetta kann t.d. verða viðkomandi í støðum, tá ið foreldramyndugleikin ikki ynskir at samstarva við barnaverndartænastuna, ella um barnaverndarnevndin metir, at tørvur er á, at

taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum foreldramyndugleikin ikki er samdur í. Eisini kann barnaverndarnevndin t.d. taka avgerð eftir ásetingini í § 21, stk. 3, tá ið mett verður, at neyðugt er at gera eina læknaliga kanning og/ella viðgerð av barninum, herundir innlegging til viðgerð á sjúkrahúsi, bæði á somatiskari og psykiatriskari deild. Avgerð kann eisini verða tikin eftir hesari áseting um barnið skal skifta skúlatilboð, og foreldramyndugleikin er ímóti hesum, ella í mun til koppseting av einum barni undir 15 ár.

Tað kann hava alstóran týdning fyri menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at atgongd er hjá barnaverndarnevndini til at taka neyðugar avgerðir um ávís persónlig viðurskifti hjá barninum.

Í summum førum er støðan tann, at foreldramyndugleikin ikki er førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð til barnsins besta um ítøkiligu støðuna, sum barnið stendur í vegna t.d sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Tað er tí týdningarmikið, at barnaverndarnevndin kann taka avgerð um ávís persónlig viðurskifti í lívinum hjá barninum, sum er best fyri barnið.

Hvørjar avgerðir barnaverndarnevndin kann taka um viðurskifti hjá barninum ella tí unga valdast um, hvat er neyðugt í mun til endamálið við heimansetanini. Avgerðin skal viðvíkja viðurskiftum, sum eftir umstøðunum er neyðugt at taka avgerð um. Hetta kann t.d. verða viðkomandi um foreldramyndugleikin setur seg upp ímóti einari avgerð, ið hevur stóran týdning í lívinum hjá barninum, og barnaverndarnevndin tískil metir, at neyðugt er at taka avgerð um hesi viðurskifti hjá barninum eftir ásetingini í § 21, stk. 3. Barnaverndarnevndin skal altíð taka atlit at ynskjum hjá barninum, um barnsins aldur og búning loyvir tí.

Barnaverndarnevndin skal ikki taka avgerð eftir ásetingini í § 21, stk. 3, um talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksomhed), sum t.d. val av kommunulækna, skúla, innkeyp av klæðum og líknandi. Faktisk forvaltningsvirksomhed er í hesum sambandi ein partur av tí dagligu umsorganarábyrgdini, sum barnaverndarnevndin yvirtekur, tá ið barnið verður umsorganaryvirtikið, og kann lata víðari til ein stovn ella fosturforeldur sambært § 21, stk. 1 og 2. Barnaverndarnevndin kann taka støðu til hesi viðurskifti í samstarvi við stovnin ella fosturforeldrini. Tó eigur at verða hugsað um, hvørji viðurskifti foreldramyndugleikin við fyrimuni kann fáa ávirkan á, soleiðis at viðkomandi framvegis hevur ávirkan á lívið hjá barninum, og kennir seg sum foreldur at barninum.

Sum liður í tí dagligu umsorganarábyrgdini kann barnaverndarstovnurin ella fosturfamiljan fremja neyðug inntriv í barnsins sjálvsavgerðarrætt fyri at tryggja barnsins áhugamál og fysiska/psykiska tørv. Sum partur av hesari umsorganarábyrgd hoyrir m.a. at fara til lækna og/ella sálarfrøðing við barninum og t.d. fyriskipaður heiligvágur. Sum nevnt omanfyri er eisini veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksomhed) partur av dagligu umsorganarábyrgdini, sum stovnurin ella fosturforeldrini kunna taka støðu til í samstarvi við barnaverndartænastuna.

Tað er einans ábyrgdin av tí dagligu umsorganini, ið barnaverndarnevndin yvirtekur og kann lata víðari til barnaverndarstovnin ella fosturfamiljuna, tá ið eitt barn verður umsorganaryvirtikið. Harafturímóti liggur rætturin til at taka støðu til ávís sera persónlig viðurskifti viðvíkjandi barninum framhaldandi hjá foreldramyndugleikanum eftir galdandi loggávu, sjálvt um barnið er sett heiman. Hetta merkir, at støðutakan til ávís persónlig viðurskifti viðvíkjandi barninum altíð krevja samtykki frá foreldramyndugleikanum.

Foreldramyndugleikin verður ikki frátikin foreldrunum, tá ið eitt barn verður umsorganaryvirtikið. Týðandi og avgerandi læknaviðgerð og læknainntriv krevur eftir galdandi lóggávu samtykki frá foreldramyndugleikanum. Eisini eru spurningar um t.d. dóp og konfirmation dømir um sera persónlig viðurskifti hjá barninum, ið eftir galdandi lóggávu fella til foreldramyndugleikan at taka støðu og avgerð um.

Í summum førum ynskir foreldramyndugleikin ikki at samstarva við barnaverndartænastuna. Í øðrum førum er foreldramyndugleikin ímóti ella ikki samdur í einari avgerð hjá barnaverndarnevndini um ávís viðurskifti hjá barninum, sum barnaverndarnevndin metir er neyðugt fyri barnið, og sum barnið sjálvt ynskir. Atlit skal altíð takast til ynskini hjá barninum, um barnsins aldur og búning loyvir tí. Harumframt er foreldramyndugleikin í ávísum førum ikki førur fyri at taka eina væl grundaða avgerð til barnsins besta um ítøkiligar støður, sum barnið stendur í vegna t.d sálarligar avbjóðingar, menningartarn, misbrúk o.s.fr. Støðan kann eisini verða tann, at foreldramyndugleikin av ymiskum orsøkum ikki er serliga tætt knýttur at barninum ella ikki hevur gott innlit í lívið ella gerandisdagin hjá barninum, og tí ikki kann gera eina væl grundaða meting av ítøkiligu støðuni hjá barninum. Tá er tað týdningarmikið, at barnaverndartænastan kann taka eina avgerð í málinum, sum er best fyri barnið.

Ein avgerð, ið gongur ímóti viljanum hjá foreldramyndugleikanum, krevur ítøkiliga heimild í lóg ella kunngerð. Tað er ikki nóg mikið at vísa til t.d. yvirskipaðið samfelagsáhugamál, almen tilmælir ella at avgerðin yvirskipað er til gagns fyri barnið.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 21, stk. 3 er at tryggja, at barnaverndarnevndin hevur heimild til at taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta. Útyvir omanfyri nevndu dømir, kann hetta eisini verða viðkomandi í mun til koppseting av einum barni undir 15 ár, harí foreldramyndugleikin er ímóti koppsetingini, og barnaverndarnevndin metir, at neyðugt er at taka avgerð um hetta grundað á týðandi atlit til barnsins besta. Sum útgangsstøði krevur koppseting samtykki frá foreldramyndugleikanum, áðrenn koppsetingin verður framd. Hetta kemst av, at koppseting er eitt týðandi og avgerandi læknainntriv, sum verður mett at liggja út yvir ta dagligu umsorganarábyrgdina hjá barnaverndarstovninum og/ella fosturforeldrunum. Metir barnaverndarnevndin, at koppseting er neyðug grundað á støðuna og viðurskiftini hjá einstaka barninum, herundir ynskini hjá barninum sjálvum, fær barnaverndarnevndin við hesum lógaruppskoti heimild at taka slíka avgerð, sjálvt um foreldramyndugleikin er ímóti avgerðini. Hetta sama ger seg galdandi í sambandi við barnakoppsetingar.

Barnaverndarstovnurin og/ella fosturforeldrini hava møguleika at virka innanfyri karmarnar av avgerðini hjá barnaverndarnevndini eftir § 21, stk. 3, men kunnu ikki sjálvi taka avgerð um, at barnið t.d. skal skifta skúlatilboð ella uppihaldsstað, ið einans barnaverndarnevndin kann taka avgerð um sambært § 21, stk. 3.

**Til § 1, nr. 6**
Í sambandi við at Almannamáláráðið í 2021 framdi eftirlit við útvaldum barnaverndartænastum kring landið varð staðfest, at ásetingin í § 42, stk. 2, nr. 5 var óneyðug í sambandi við at skriva eina gerðabók um fundirnar hjá barnaverndarnevndini. Ásetingin verður tískil strikað.

**Til § 1, nr. 7**
Sambært barnaverndarlógini verður barnaverndarøkið umsitið av staðbundnum kommunalum barnaverndartænastum. Barnaverndarmál verða umsitin alt eftir, hvar tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, búgva. Heimild er ikki í galdandi barnaverndarlóg hjá nøkrum

myndugleika at taka avgerð um, at flyta eitt barnaverndarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita.

Eitt barnaverndarmál verður tó sjálvvirkandi flutt, um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, flyta bústað til eitt annað barnaverndarøki, sbrt. § 58 í barnaverndarlógini.

Í heilt serligum førum kann tørvur verða á, at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Hetta kann t.d. verða vegna eina sera fastlæsta støðu hjá ávísum foreldrum í einum ítøkiligum barnaverndarmáli. Tørvur kann í hesum førum verða á, at ein onnur barnaverndarnevnd yvirtekur málið at viðgera og meta um. Í summum førum kann hetta gera mun fyri samstarvið og samskiftið við barnaverndartænastuna um málið, og verða til gagns fyri bæði barnið og familjuna. Hetta verður tó einans møguligt í heilt serligum førum, harí barnaverndarnevndin metir, at hetta er alneyðug fyri samstarvið og samskiftið í málinum, og fyri barnið og foreldrini.

Er talan um fleiri systkin við somu foreldrum, ið hava hvør sítt barnaverndarmál í einari barnaverndartænastu, kunna øll málini ella bert eitt av málunum verða flutt til eina aðra barnaverndartænastu. Hetta metir avvarðandi barnaverndarnevnd um.

Heilt serligar umstøður eru t.d tá eitt barnaverndarmál hevur koyrt í fleiri ár hjá somu barnaverndartænastu, harí samskifti og samstarvið millum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

Avvarðandi barnaverndarnevnd setur seg í sambandi við eina aðra barnaverndarnevnd, ið er egnað og villig til at viðgera og meta um málið. Barnaverndarnevndirnar gera eina skrivliga avtalu um, at nýggja barnaverndarnevndin yvirtekur ábyrgdina av málinum, og kemur at umsita málið varandi. Nýggja barnaverndarnevndin viðger málið á sama hátt, sum tá foreldramyndugleikin flytur bústað til eitt annað barnaverndarøki sambært § 58, stk. 1. Hetta merkir, at nýggja barnaverndarnevndin metir ikki um málið av nýggjum, men heldur áfram har fyrrverandi barnaverndartænasta slepti. Nýggja barnaverndarnevndin kann tó velja, at viðgera málið av nýggjum og/ella gera nýggjar metingar, og seta nýggjar ella aðrar fyriskipanir í verk fyri barnið og familjuna. Tann barnaverndarnevndin, ið hevur ábyrgdina av málinum, rindar útreiðslurnar, ið standast av málinum.

Avvarðandi barnaverndarnevnd metir sjálv um, um tað er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt barnaverndarmál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita. Barnaverndarnevndin tekur støðu til henda spurningin eftir umbøn frá foreldramyndugleikanum. Metir avvarðandi barnaverndarnevnd ikki, at tað av ymiskum orsøkum (t.d. atlit til barnið) er neyðugt og ráðiligt at flyta eitt mál til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita, er henda metingin endalig, og kann ikki leggjast fyri annan fyrisitinarligan myndugleika at taka støðu til. Grundin til hetta er, at avvarðandi barnavernarnevnd kennir málið best, og hevur nágreiniligt innlit í allar síður og støður í málinum, fyriskipanir og viðurskifti hjá barninum og familjuni. Avvarðandi barnaverndartænasta er tí best skikkað til at meta um, um tað er neyðugt og ráðiligt fyri barnið og familjuna, at flyta málið til eina aðra barnavernarnevnd at umsita.

Endamálið við nýggju ásetingini í § 58, stk. 4 er at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, harí málið og støðan tykist so fastløst og vónleys, eins og samskiftið og

samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, xx. 2024

**Djóni Nolsøe Joensen**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen